Kommunufelagið

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
KVÍGGJARTÚN 1
POSTBOX 2039
165 ARGIR

Dagfesting
29. september 2017

Okkara j.nr.
17/03134-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.
16/00255-10

**Viðv. hoyringsskriv KF, um stuðul til persónar við bústaðarskyldu**

Fíggjarmálaráðið hevur 21. sept. sent Kommunufelagnum "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum" (Stuðul til persónar við bústaðarskyldu) , til hoyringar. Hoyringsfreistin er 29. sept.

Kommunufelagið vil sum so ofta áður gera vart við stuttu hoyringsfreistina. Hoyring er ein grundleggjandi partur av okkara fólkaræði, og minsta krav er, at hoyringspartar fáa rímiliga tíð at viðgera uppskotini frá landsstýrinum.

Kommunufelagið hevur ikki viðmerkingar til innihaldið í uppskotinum. Tó metir felagið, at Fíggjarmálaráðið átti at kunna gjørt eina meting av fíggjarligu avleiðingunum av uppskotinum, hóast hesar neyvan eru stórar.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri